# Beinta skal hava eftirlit við tølunum

Tað er nú greitt, at Beinta Dam verður nýggjur landsgrannskoðari. Tað nú greitt, at tað verður Beinta Dam, sum verður nýggjur landsgrannskoðari. Leivur Harryson segði seg herfyri frá sum landsgrannskoðari og nú hevur landsstýrið útnevnt avloysaran og tað verður Beina Dam. Hon tekur við starvinum tann 1. januar. Beinta Dam er 47 ára gomul og úr Runavík, men hon býr í Havn. Hon er Cand Merc Aud, ella kanditatur í grannskoðan, sum tað oftast verður kallað nú á døgum. Hon hevur arbeitt hjá landsgrannskoðaranum seinastu 11 árini.



# Betri fiskaterminalur í Skagen

Nú verður hond eisini tikin um at nútímansgera móttøku og uppboðssøluviðurskiftini í Skagen, so hesi svara til nýggju krøvini fyri slíkum virksemi. Býurin er nevniliga hin seinasti av stóru donsku fiskivinnubýunum, sum ikki hevur nýbygda uppboðssøluhøll og dagførdan samlisentral. Ætlanin er, at byggingin, sum væntandi fer at kosta einar 13,9 miljónir krónur, skal standa liðug og klár at taka í nýtslu í komandi ári.



klokkan 5.45 og longu klokkan 6.15 stilnaði av aftur.

- Har komu fleiri hvirlur, og eg rokni við, at tað hevur verið ein eyka sterk, sum lyfti yvirtromina upp av Mekanik, metir Jonhard Petersen.

Tá vit tosaðu við hann seinnapartin sum hendingin fór fram um morgunin, undraðist hann framvegis á, at hann kundi bakka bilin so snórabeint eftir vegnum, tí hann konsentreraði seg ikki um at stýra, men bara at sleppa burtur frá sveimandi yvirtromini.

- Sum eg segði við konuna aftaná: Eg veit ikki, hvør stýrdi bilinum ta løtuna, eg ella Várharra, sigur Jonhard Petersen.

Hann slapp tíbetur púra snikkaleysur frá hesi skakandi hendingini – og tað gjørdi bilurin eisini. Hvørgin teirra fekk eina einastu skrammu.



*bingjur á tekjuna fyri at halda henni í nógva vindinum*

# Trýstsár eru ein vaksandi trupulleiki



*Tiltakið var sera væleydnað og avgerð er longu tikin um, at skipað fyri líknandi átaki*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



**Síðst í oktober varð ljós varpað á fyribyrging og viðgerð av liggisárum og bláæðraðum beinsárum á Landssjúkrahúsinum, har serfrøðingar kunnaðu um og vístu fram fyribyrgjandi hjálpartól**

TRÝSTSÁR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Trýstsár eru ein vaksandi altjóða trupulleiki, sum fyri sjúklingarnar førir við sær stóran bága av pínu og stikni, umframt at verða bundin at starvsfólki til viðgerð.

Samfelagsliga krevur tað nógvar ressursir í øktari innleggingartíð, dýrum viðgerðum og nógvari orku hjá starvsfólkunum.

Útrokningar vísa, at eitt djúpt liggisár kostar umleið 200.000 krónur um árið í viðgerð, samstundis sum hesi sár kundu og áttu at verið fyribyrgd.

Í sambandi við temadagin høvdu útlendsku fyritøkurnar Mölnlycke og Huntleigh Healthcare skipað fyri eini »workshop«, ein framsýning, ið sýndi madrassur og sitipútur, ið lætta um og fyribyrgja. Eisini varð upplýst um framkomin viðgerðarevni.

Bláæðrað beinsár, sum er mest vanliga slagið av sárum, kunnu eisini fyribyrgjast. Hesi standast av vánaligum blóðrensli í beinunum.

Seinasta nýggja innan viðgerð av hovnaðum beinum og bláæðraðum beinsárum er ein sonevnd trýstpumpa, sum kann taka burtur vætu úr beinunum, sum er orsøk til sár. Trýstpumpan kann skunda undir sárgrøðingina. Flowtron pumpan, sum hon verður nevnd, varð eisini sýnd fram og roynd av teimum vitjandi.

Eisini vórðu sýnd fram ultraljóðstól, sum vísa, hvussu renslið er í beinunum.

Ymiskar nútímans vørur við serligum atliti at liggisárum vóru sýndar fram. Hesar vørur eru mentar á ein slíkan hátt, at tær tryggja eina skjóta, behagiliga og pínulinnandi grøðing av sárum, sum ikki krevur viðhaldandi skift.

Báðar dagarnar vóru fyrilestrar hildnir um at fyribyrgja og viðgera liggisár. Klinisk yvirsjúkrasystir, Susan Bermark, frá centrinum fyri sárgrøðing á Bispebjerg Hospital, helt fyrilestrarnar.

Fyrireikararnir eru ógvuliga fegnir um góðu undirtøkuna, sum tiltakið fekk, og tí er ikki óhugsandi at líknandi tiltak verður fyriskipað aftur - eisini uttan fyri Havnina.

Um onkur ynskir at fáa meira at vita um nýggju viðgeramøguleikarnar knýttir at hesum hjálpartólum, ber til at seta seg í samband við Marjun Vilhelm, sársjúkrasystir í Heimatænastuni í Tórshavn.